# Bárður Nielsen í bretska parlamentinum



*Tony Blair og Gordon Brown*

**– tá tað verður sett av Tony Blair mikudagin**

TILTAK Í LONDON

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Mikudagin verður stór samkoma í London, har fokus verður sett á Føroyar sum framtíðar íløguland. Tað er føroyska umboðsstovan, sum skipar fyri tiltakinum, ið hevur til endamál at eggja útlendskum íleggjarum at seta pengar í føroyskt vinnulív. Her verður serstakliga hugsað um eina møguliga framtíðar oljuvinnu m og komandi privatiseringar av almennum fyritøkum.

Umleið 80 vinnulívsfólk og tíðindafólk hava teknað seg til tiltakið, har tað fer at verða greitt frá møguleikunum at gera íløgur í Føroyum í framtíðini. Fíggjarmálaráðharrin Barður Nielsen fer at røða eins og umboð fyri Oljufyrisitingina og føroyska oljufelagið Føroya Kolvetni fara at greiða frá. Týsdagin fara umboð fyri føroyskt vinnulív við Atlantsflogi til London at vera við til tiltakið, sum føroyski umboðsmaðurin John Rajani er vertur fyri. Eisini verður høvi at vitja á donsku sendistovuni í býnum.

Í sambandi við vitjanini er ætlanin eisini at skipa fyri øðrum tiltøkum. Mikudagin bjóðar Statoil í London til kunningarløtu, har framløgu verður um virksemið hjá Statoil í Bretlandi við serligum atliti til gassmarknaðin.



*Bárður Nielsen*

Sama dag verður bretska parlamentið sett fyrstu ferð eftir valið. Tá verða eisini umboð fyri landsstýrið til steðar. Fíggjarmálaráðharrin fer at vera millum gestirnar, tá starvsfelagi hansara Gordon Brown og Tony Blair forsætisráðharri fara at leggja fyri og seta tingið.

Ætlanin er so eisini, at føroysku umboðini skulu vitja á London Stock Exchange.

Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri skal eisini vitja á oynni Man, har hann fer at kunna seg við serstøku støðuna, sum oyggin hevur á eitt nú fíggjarmarknaðinum.

Sosialin

-so eru tit við!

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

Starvslýsing

## Undirstjóri til Føroya Realkreditstovn

Fyri Føroya Realkreditstovn verður søkt eftir undirstjóra at byrja skjótast til ber.

**Um Føroya Realkreditstovn**
Virksemið hjá Føroya Realkreditstovni fevnir um útlán við veð í fiskiførum, flótandi eindum og førum í frálandsvinnu og fiskaaling við heimstaði í Føroyum.

Stovnurin verður stjórnaður av einari trímannastjórn, ið verður tilnevnd av landsstýrismanninum í Fíggjarmálum.

Á stovninum eru 2 starvsfólk, umframt undirstjóran.

**Starvið**
Undirstjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Føroya Realkreditstovni við ávísing til stjórnina.

Stjórin skal í neyvum samarbeiðið við stjórnina, hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni av framhaldandi rakstri felagsins, herundir skipa fyri veitan av lánum og røkt av núverandi lánum.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

? hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til roknskap og fíggjarviðurskifti
? hevur hollan kunnleika til vinnuøkini sum útlánini hjá stovninum fevna um og samfelagsviðurskifti sum heild
? hevur leiðsluroyndir
? dugir at arbeiða sjálvstøðugt
? hevur góð samstarvsevni
? dugir væl at málbera seg í skrift og talu.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir, skal sendast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f, í seinasta lagi 15. juni 2005.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 45 ella 54 34 45.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 34 34 54
Telefax

TEAM85

